Skúlastýrisfundur 9. oktobur 2025

Luttakarar:
Annita á Fríðriksmørk, Anna Maria Reinert Jensen, Margith Lamhauge, Trygvi í Liða, Theodor Eli Dam Olsen, Mass Hoydal og Elin Maria Ó. Olsen.

1. Framløgur frá næmingaráðunum

Næmingaráðini í grunddeild og miðdeild løgdu fram síni mál og ynski fyri komandi skúlaár.
Felags evni vóru **floksins tími** og **batar til fótbóltsvøllin**.

- Skúlastýrið stuðlar hesum málum og heitir á leiðsluna um at:
    - boða lærarunum frá ynskinum um floksins tíma
    - stuðla umsóknini um betran av fótbóltsvøllinum.

Leiðslan greiddi frá, at lærarar ikki kunnu áleggjast at hava floksins tíma, tí hetta fellur innan teirra undirvísingartíð. Tó ber til at kunna lærararnar um, at hetta er eitt ynski frá næmingaráðunum.

Mass Hoydal greiddi frá møguleikanum fyri at leggja við eina **stuðulsyvirlýsing**, ið kann styrkja umsóknina til kommununa um fótbóltsvøll.

Avtalað varð, at:

- Skúlastjórin skrivar eina umsókn,
- Skúlastýrið skrivar eina umsókn,
- Næmingaráðini skriva hvør sína umsókn,
- Einstakir næmingar fáa møguleika at skriva, hví teir ynskja nýggjan vøll.

2. Námsferð

Skúlastjórin greiddi frá umrøðuni í námsfrøðiliga ráðnum, har avgerðin frá seinasta skúlastýrisfundi varð løgd fram.

Spurningar, ið vórðu tiknir upp:

- Hvat ger eina námsferð góða?
- Hvønn er hon ætlað fyri?
- Hvussu skal hon fíggjast?

Lærarar vóru samdir um, at námsferðir kunnu skipast í samráð við foreldur. Tó varð mett, at tað er hóskiligari at fara í 8. flokki heldur enn í 9. flokki, tí:

- 9. flokkur hevur bert umleið 2/3 av skúlavikunum, orsakað av starvsvenjing, verkætlan og prógtøkufyrireiking.
- Í 8. Flokki fær skúlin størri gleði av samansjóðingini, av tí at næmingarnir hava longri tíð eftir á staðnum.
- Líkindi fyri rúsdrekkanýtslu eru minni í 8. flokki.

Avgerð:
Skúlastýrið góðtekur, at námsferðin verður framd í 8. flokki heldur enn í 9. flokki.

3. Fundur í námsfrøðiliga ráðnum

Sí punkt 2.

4. Fundur við borgarstjóran / býráðið

Fundurin er útsettur til 28. oktober kl. 14.00.

5. Jólahaldið 2025

Theodor spurdi, hvussu jólahaldið verður skipað í ár.

Skúlastjórin greiddi frá, at í fjør vóru tríggir flokkar ikki við í jólahaldinum, fyri at tryggja betri pláss og betri framførslur í kirkjuni. Hesir flokkarnir høvdu tó øðrvísi jólahald. Hetta elvdi til ónøgd millum summi foreldur.

Ætlanin er at halda fast við somu skipan í ár, við einum flokki í hvørjari deild, sum hevur egið jólahald uttanfyri kirkjuna.
Fleiri foreldur vóru nøgd við hesa skipan, men summi ynsktu, at øll børnini og foreldur teirra kundu luttaka í kirkjuhaldinum.

Møguligar loysnir vóru umrøddar:

- At hava serliga ommu- og abbaframførslu uttanfyri kirkjuna.
- At lata tvey atgongumerki pr. barn.
- At skipa jólahaldið í tveimum pørtum sama dag, so øll sleppa í kirkjuna, men hittast í pyramiduhøllini í steðginum.

Viðmerking var um at fólk ofta eru ónøgd við broytingar, og møguliga fleiri verða ónøgd, um vit broyta aftur í ár.

Trygd og pláss eru høvuðsatlitini hjá skúlastjóranum, tí kirkjan hevur verið ov full, og vandi hevur verið fyri, at fólk kundu komið til skaða.

Avgerð:
Skúlastýrið heitir á skúlan um at arbeiða við eini loysn, har øll, næmingar og foreldur kunnu luttaka í jólahaldinum, soleiðis at eingin illvilji er, og jólahugnin er í hásæti.

6. Annað

Bygginevnd til nýggjan skúla

- Ynski varð framsett um, at skúlastýrið eisini hevur umboð í bygginevndini, umframt skúlastjóran.
- Annita greiddi frá, at hetta ikki er vanligt.
    - Vit kenna dømi um stjórar, ið hava sitið í bygginevndini, men hetta hevur kravt trýst frá teimum.
- Theodor sendir teldupost til Hermann Mortensen við umbøn um, at bæði skúlastjórin og formaðurin í skúlastýrinum luttaka á fundinum síðst í oktober.

Annita greiddi frá at arbeitt verður eisini við fyribils loysnum, meðan skúlabygging er, t.d. barakkum til undirvísing á økinum hjá Fjarhitafelagnum.
Ósemja var um, hvørt hetta økið er hóskandi, orsakað av vindi.

Trygvi vísti á, at tað kunnu ganga fleiri ár, áðrenn nýggi skúlin verður veruleiki, og at arbeiðið við núverandi skúla eigur at halda áfram sjálvstøðugt – t.d. við betringum á vøllinum, nýggjum spæliplasti o.ø.

Vit hava longu nú avbjóðingar við hølisviðurskiftum, og tosað var um at arbeiða fyri nýggjum barakkum, fyri at leggja á kommununa um at skunda undir skúlabyggingina.

Ferðslupatrúlja:
Elin Maria fer í næstum at kanna møguleikar við næmingum og kommununi um at seta ferðslupatrúlju í verk. Hetta kann lønast við stuðli til námsferð.

Morgunsangur í desember:
Ætlanin er, at byrja hvønn skúladag í desember við morgunsangi, fyri at skapa felagsskap og vana, umframt at læra jólasangir og sálmar.

Spælibólkar:

- Trygvi setur spurning um spælibólkar eru í øllum flokkum. Hann metir hetta vera gott fyri trivna og felagsskap.
- Anna Maria greiður frá at flokslærarin leggur hugskotið fram fyri foreldrum, og foreldrini taka støðu til, um spælibólkar skulu vera í flokkinum.
- Um spælibólkar verða, skipar flokslærarin bólkarnar.
- Anna Maria kannar, um hetta er framt í øllum flokkum.

Næsti fundur verður mikukvøldið 5. November kl 17.30, og vit enda fundin við at fara út at eta.

Fundurin lokin kl. 18:30.